

*Beinta Poulsen úr Havn er av álvara um at bíta seg fasta í mótavinnuna. Merkið hennara Soul Made er at fáa í sjey ymsum londum, og Beinta arbeiðir hart fyri, at víðka enn meiri um virksemið*

*Myndir: Sunva Eysturoy Lassen*

# Leggur heimin fyri sínar føtur

**Hon selur síni pløgg í USA, Hollandi, Japan, Týsklandi, Danmark, Svøríki og Føroyum. Sniðgevin Beinta Poulsen úr Havn hevur arbeitt seg upp frá grundini við merki sínum Soul Made, men hóast hon er komin langt, setur hon seg ikki hendur í favn. – Eg vil altíð røkka enn longri, sigur hon**

Hon byrjaði við einum lítlum handli, har hon seldi egna framleiðslu. Men í 2005 víðkaði Beinta Poulsen, sum er útbúgvin sniðgevi, virksemið, stongdi handilin, og selur nú bert klæði síni í heilsølu. Og klæði hennara fáast í sjey ymsum londum.

Hóast mótavinnan er tiltikin hørð at fóta sær í, hevur Beinta megnað tað. Bara í Danmark kunnu klæði hennara keypast í fleiri enn 30 handlum, og tað er nógv, tá hugsað verður um, at hon bert hevur verið sjálvstøðug í knøpp tvey ár.

Harumframt hevur hon fingið fleiri altjóða góðkenningar, t.d. á eini stórari messu í Hollandi, tá Soul Made var kosið at vera ímillum 10 tey bestu merkini, og hetta var ímillum so kend merki sum t.d. French Connection og Modstrøm.

## Ikki ætlanin

Beinta tók prógv sum sniðgevi á kenda Colombine skúlanum í Keypmannahavn í 2003. Hon vildi sleppa í gongd við at framleiða og selja beinanvegin, og saman við eini aðrari gentu frá skúlanum, stovnaði hon merkið Soul Made, sum tær sjálvar seldu í einum lítlum handli í Keypmannahavn.

- Men hetta hevur ikki verið mín barndómsdreymur, og tað var faktiskt rættiliga tilvildarligt, at eg fór hendan vegin, sigur Beinta.

Hon greiðir frá, at hon hugsaði um at fara niður at lesa turismu ella okkurt tílíkt, men hon visti ikki, um hon fór at trívast í Keymannahavn. Tí søkti hon fyrst inn á ein seymi-skúla, sum var uppbygdur í modulum.

- Mær hevur altíð dámt væl at seymað, og eg hugsaði sum so, at eg kundi fyrst taka eitt modul, sum varir í tríggjar mánaðir, fyri at vita, um eg treivst í Keypmannahavn. Tá eg kom heimaftur, var eg so bitin av at tekna mynstur og seyma, at eg sat við tí hvønn einasta dag. Tá helt eg, at eg hetta var nakað, sum eg mátti útbúgva meg í, greiðir Beinta frá.

Eftir at skúlin var liðugur, vóru tær tvær, ið høvdu sama dreym um at gera ein handil og selja egnar vørur, og tær lupu bara útí og fóru til verka.

-Vit gjørdu alt sjálvar. Teknaðu, seymaðu og seldu, og vit høvdu ikki ráð at seta nakað hjálparfólk. Tað var øgiliga strævið, og vit kundu ongantíð arbeiða niðurfyri, tí tað, vit seymaðu, mátti kunna seljast í handlinum beinanvegin, sigur Beinta.

So tá hin gentan fór at tosa um at útbúgva seg meiri, gjørdi Beinta av, at hon fór at broyta konseptið við Soul Made, og selja í heilsølu heldur enn í egnum handli.

- Eg dugdi at síggja, at um eg ætlaði mær at koma nakran veg innan mótaheimin, mátti eg savna meg um at sniðgeva og administrera, og so lata onnur um at selja mínar vørur. Á messum, sum eg var á, kom eg skjótt í samband við nógv fólk, ið bjóðaðu seg fram sum seljar-ar, framleiðarar, umframt onkrar handlar, ið kundu hugsað sær at selt mínar vørur. So eg fekk nógv netverk, ið